# Aftur ein rækjutrolari fer nú undir hamaran

**South Island hjá vágbingum er lagdur og verður seldur á tvingsilssølu í næstum**

RÆKJUKREPPA
*Áki Bertholdsen*



*South Island liggur við bryggju í Havn og loysir ikki aftur. Sostatt er triði rækjutrolarin farin av knóranum. Eigararnir hav slept øllum vónum um at bjraga honum og hann verður nú seldur á tvingsilssølu*

Kreppan hjá rækjuflotanum hevur nú ført til at enn ein trolari er farin á húsagang.

South Island, fekk ikki meiri enn trý ár í føroyska fiskiflotanum, tí nú er hann lagdur og fer undir hamaran.

Øll manningin er søgd upp og reiðarin, Eli Frederiksen, í sigur, at ongar vónir er um at bjarga honum og tí fer hann undir hamaran.

Hann kom á Havnina mitt í farnu viku og har verður hann liggjandi til verkfallið er av og hann sleppur at avreiða.

Tað vóru stórar vónir wettur til South Island, tá ið vágbingar keyptu hann úr Íslandi tíðliga í 2000, men síðani hevur tað verið ein long mótbrekka hjá honum eins og hjá øllum hinum rækjuskipunum.

Og nú hava so fíggingarstovnarnir sagt kredittin upp og vilja ikki fíggja hann meiri og so er bara ein vegur og tað er undir hamaran.

Reiðarin sigur, at báturin hevur fiskað væl, tó at hann ikki minnist tonsatalið.

Men prísurin hevur verið út av lagið vánaligur í longri tíð og hartil hevur oljuprísurin rættiliga tikið himmalfluktina.

Og nú South Island liggur í Havn og bíðar eftir at sleppa av við veiðina, fáa teir ikki so frægt sum sjey krónur fyri kilo av ídnaðarrækjunum.

Og marknaðurin fyri tær kókaðu rækjurnar eru so vánaligur, at teir hava ongan sum helst prís fingið fyri tær enn og tær verða tískil lagdar á goymslu í vónini um at sleppa av við tær seinni.

Eli Frederiksen sigur, at prísurin fyri ídnaðarrækjurnar skuldu helst verið einar 12 krónur kilo og tær kókaðu rækjurnar skuldu helst gingið fyri einar 18-20 krónur kilo.

### Ongin glotti fyri framman

Hann sigur ,at tað er ikki til at siga, hví støðan á heimsmarknaðinum er blivin so vánalig.

– Men veruleikin er, at tað eru matstovur kring um í heiminum, sum keypa tað mesta av rækjunum. Og matstovuvinnan er eisini í svárari kreppu nógva staðni, tí óttin fyri yvirgangsatsóknum ræðir fólk frá at fara á matstovur at eta.

Samstundis hava bæði kanadiarar bara økt rækjukvoturnar í takt við at prísurin er fallin fyri at halda stand og grønlendingar fylgja eftir og er bara við til at trýsta prísirnar enn meiri.

Og hann sigur frá fólki, sum fylgja við rækjumarknaðinum, at ongin glotti er at hóma og at kreppan í rækjuvinnuni kann fyri tað vara nøkur ár enn.

Vágbingar keyptu South Island úr Íslandi í februar í 2000 fyri 60 milliónir krónur og hann skuldi fiska fyri 31 milliónir um árið fyri at bera seg.

Men tað hevur verið so langt frá, tí hvørki í 2001 og 2002 fiskaði hann so frægt sum fyri raksturin og tíðansheldur hevur nakað avlop verið at betala avdráttir við. Men í fyrstuni kláraðu teir so dánt renturnar.

–Sostatt er skuldin bara vaksin og vaksin og tað var onki at gera longur. Hvussu stór skuldin er, minnist hann ikki í løtuni.

Eli Frederiksen sigur, at teir, sum nú eiga bátin, hava slept honum og fara ikki at royna at fáa hann aftur.

Upprunaliga er South Island kendi íslendski trolarin Bessi. Hann varð bygdur í 1989 og hevur fiskað avbera væl. Í 1996 varð hann umbygdur til rækjur.

### Ikki tann síðsti

Eli Frederiksen sigur, at South Island er triði rækjutrolarin, sum fer av knóranum, bæði Hvannaberg, sum eisini vágbingar áttu og Kappin úr Havn eru farnir frammanundan.

Og hann væntar, at sum støðan er í løtuni verður South Island ikki tann seinasti, so vánalig er støðan.

–Nakrir rækjutrolarar eru eftir, men tað sær svart út hjá øllum flotanum nú.

Samstundis hevur landsstýrismaðurin í fiskivinnumálum gjørt púra greitt fyri kortum, at ongi politisk stig verða tikin fyri at bjarga rækjutrolarunum.

Hann skal ikki siga, at tað var hendan útsøgnin, sum fekk fíggingarstovnarnar at geva skarin yvir beint nú, tí tað kom nokk so knappliga, men tað kann vera, heldur hann.

Tí er alt, sum bendir á, at South Island nú fer av landinum aftur.

# Arbeiðsgevarar kanna blokadur

**Arbeiðsgevarafelagið er farið at kanna hvussu umfatandi blokadurnar eru, sum teir siga eru ólógligar**

VERKFALL
*Áki Bertholdsen*



*Enn er støða ikki tikin til um blokadurnar skulu herðast. Føroya Arbeiðsgevarafelag sigur, at summar blokadur eru ólógligar og tær verða nú kannaðar*

Føroya Arbeiðsgevarafelag er nú farið at kanna eftir, hvussu umfatandi blokadurnar ímóti teimum ymsu fyritøkunum og arbeiðsplássini eru.

Síðani verkfallið varð lýst, hava arbeiðarafeløgini blokerað seraliga heilsølur og vørugoymslur.

Jan Mortensen á Arbeiðsgevarafelagnum sigur, at arbeiðsgevararnir fara ikki at gera nakað við blokadur, sum hava til endamáls at forða fyri at vøra sum so verður flutt.

Men at forða fólki, sum vanliga plaga at heinta sínar vørur, at gera tað, nú verkfall er, er ólógligt.

Hann sigur, at tað er ikki óvanligt, at handilsmenn sjálvi heinta vørur frá heilsølum og av goymslum og at tað eisini er vanligt, at handverksmeistarar sjálvur heinta timbur og tilfar frá timburhandlum.

–Og at nokta teimum tað, nú verkfall er, er ólógligt, sigur Jan Mortensen.

Hann sigur, at Føroya Arbeiðsgevarafelag er nú farið at kannað eftir, hvussu umfatandi tær ólógligu blokadurnar eru.

Men um meiri skal gerast við málið, er ikki viðgjørt enn.

Men hann væntar ikki, at arbeiðsgevarafelagið fer at taka stig til at melda.

– Men eru tað fyritøkur, sum føla seg gingnar ov nær, stendur tað teimum sjálvsagt frítt fyri at biðja løgregluna hjálpa sær við trupulleikanum, sigur hann.

– Annars er tað greitt staðfest at tað er ólógligt at blokera vegir. At so Arbeiðarafeløgini siga, at tey ikki leggja nakað í tað, má standa fyri teirra egnu rokning, sigur Arbeiðsgevarafelagið

### Væntar boð

Fyrrapartin í gjár høvdu arbeiðsgevararnir enn onki hoyrt frá semingsmonnunum. Men teir sótu framvegis og bíðaðu.

Spurningurin er so, um nakað er at samráðast um enn.

Jan Mortensen endurtekur, at arbeiðsgevararnir vilja undir ongum umstøðum tosa um eina lønarhækking ið íkist tí, sum arbeiðarafeløgini hava kravt.

### Ikki fleiri undantøk

Arbeiðarafeløgini bíða eisini.

Georg Hansen, næstformaður í Føroya Arbeiðarafelag, sigur, at verður tað neyðugt at herða blokadurnar, verður tað gjørt, men enn hevur tað ikki verið viðgjørt.

Hann sigur, at verkfallið merkist meiri og meiri fyri hvønn dag, sum gongur. Nú eru bussarnir hjá bygdaleiðum og postbilarnir við at verða settir.

Og Georg Hansen sigur, at tey fáa ikki undantaksloyvi til at fylla tangarnar.

Hinvegin fáa strandfaraskipini undantaksloyvi til at bunkra olju



# Milliónir standa uppá spæl

**Um verkfallið stendur við í juni mánaða, so kann hetta gerast ein trupulleiki fyri týsk sjónvarpslið, sum koma til Føroya. Tí um heilt illa stendur til, so sleppa týsku sjónvarpsbilarnir ikki í land**

FÓTBÓLTUR
*Ingrid Bjarnastein*



*Um illa vil til, so standa fleiri milliónir uppá spæl í juni mánaða, um verkfallið stendur við. Um heilt illa stendur til, so sleppa týsku sjónvarpsliðini ikki í land við bilunum, og tískil ber ikki til hjá teimum at senda víðari frá sjálvum dystinum*

Verkfallið hjá arbeiðaranum kann raka rættiliga meint, og um illa vil til og verkfallið stendur við inntil juni mánaða, so kann tað bera soleiðis á, at týsku sjónvarpsbilarnir, sum skulu senda frá dystinum ikki sleppa í land í Føroyum, og soleiðis ikki kunnu senda dystin víðari til allar tær milliónirnar, sum sita og bíða niðri í Týsklandi.

– Um so er, so verður tað katastrofalt, sigur Dánjal Andreasen, formaður í Fótbóltsambandi Føroya í stuttari viðmerking.

Fótbóltsambandið hevur sáttmála um sjónvarpsrættindini við Sport 5, sum síðani hevur selt rættindini víðari til týska filmsfelagið ARD, og dysturin millum Føroyar og Týskland skal so forvinna peningin innaftur, sum Sport 5 hevur brúkt uppá at keypa rættindini til frá føroyingum.

Her kann nevnast, at fyrrverandi formaðurin í FSF, Torleif Sigurðson segði aftaná lutakastið í 2001, at tað at Føroyar vóru komnar í bólk saman við Týsklandi merkti einar seks milliónir krónur eyka til Fótbóltsambandið. Og nakrar av teimum milliónunum koma uttan iva frá sjónvarpsrættindunum til sjálvan dystin. Tískil kunnu milliónir koma at standa uppá spæl um verkfallið ikki er av í juni. Týsku filmsliðini koma helst til Føroya í vikuni undan dystinum.

### Tórsvøllur klárur

Men hvussu er ella ikki, so verður Tórsvøllur, har dysturin skal spælast, klárur. Tað er Poul Michelsen, formaður í grunninum fyri Tórsvøll, ikki í iva um.

– Vøllurin verður klárur og alt anleggið sum heild verður klárt, og tað verður so gott, sum tað kann vera, sigur Poul Michelsen.

Sjálvt um landið liggur lamið av verkfallinum, hevur hetta ikki ávirkað Tórsvøll munandi.

– Á Tórsvølli eru tvær enterprisur, sum arbeiða. Byggitek arbeiðir enn, tí har eru tað handverkarar, og teir eru ikki umfataðir av verkfallinum. Í suðurendanum arbeiðir Gunnar Waagstein, men hetta arbeiðið liggur stilt í løtuni, men tað er ongin vandi í tí. Tí sjálvt um hetta arbeiðið ikki verður liðugt, so ber væl til at spæla dystin hóast alt, greiðir Poul Michelsen Sosialinum frá.

Restin av arbeiðnum er sjálvboðið og krevur tí onga lønútgjalding, og hetta arbeiðið heldur eisini fram sum vanligt.

– Eg skal ásanna, at tað verður pirriligt, um verkfallið heldur fram inn í juni mánaða, men eg eri mest bangin fyri týsku sjónvarpsbilunum, tí um teir ikki sleppa í land at senda frá dystinum vegna verkfall, so verður hetta ein katastrofalur fíggjarligur missur. Sjálvur Tórsvøllur verður klárur. Um ikki annað so klárur, at alt riggar.

Poul Michelsen ivast ikki í, at støðið á Tórsvølli fer at verða fult so gott sum alla aðrastaðni.

Vit hava roynt at fingið eina viðmerking frá arbeiðsmannafeløgunum, men ongin hevur verið at hitta vegna fundarvirksemið fyrrapartin í gjár.

## VIÐMERKINGAR

# Fútin og Arbeiðsgevarafelagið avdúka seg

*Føroya Arbeiðarafelag*

*Havnar Arbeiðskvinnufelag*

Vit hava í farnu viku sæð, at Arbeiðsgevarafelagið nú varpar út skriv, sum danska Løgmálaráðið hevur skrivað í samband við kæru, sum undirritaðu feløg sendu um framferðina hjá donsku løgregluni í Føroyum undir verk-fallinum í 2001, tá løgreglumenn sera ágangandi gjørdu seg inn á fakfelags-fólk.

Helst er eingin ivi um, at fútin ella varafútin hava latið Arbeiðsgevarafelagnum avrit av nevda brævi.

Váttar illgruna okkara um, at fútin og løgreglan ganga ørindi arbeiðs-gevaranna.

Hetta, at Arbeiðsgevarafelagið nú fer í fjølmiðlarnar við brævinum, sum teir óivað hava fingið av fútaskrivstovuni váttar illgruna okkara um, at fútin og løgreglan tæna arbeiðsgevarasíðuni, tá fakfeløg royna at vinna limum sínum sømulig lønar- og starvssetanarkor.

Hetta, at løgreglan tænir teimum sum hava maktina í samfelagnum er einki nýtt, tí somu royndir hava fakfeløg í grannalondum okkara.

Løgrelumenn og arbeiðsgevarar teirra standa saman.

Tað er neyvan nakað nýtt í tí, at løgreglumenn halda hondina yvir hvørjum øðrum, og í Danmark hava vit fleiri dømi um, at leiðslan fyri løgregluni har, í flest øllu førum heldur hondina yvir løgreglumonnum sínum.

Tað er tí ikki at undrast á, at hóast vit høvdu fleiri dømi um ein framferðarhátt, sum ikki átti at komi fyri í einum rættarsamfelag, so kom danska løgmálaráðið við vanliga lestrinum um, at tey »grundað á frágreiðinga frá løgregluni« ikki metti at nakað skeivt varð gjørt. Hvussu kunnu vit vænta annað, tá løgreglan skal kanna seg sjálva?

Arbeiðsgevarafelagið etur alt rátt, og frá teirra síðu verður ikki sett eitt einasta spurnartekin við á hvørjum grundarlag løgmálaráðið hevur viðgjørt kæru okkara. Og hví skal arbeiðsgevarafelagið eisini tað? Tað passar jú í teirra kramm, at eingin verulig kanning fer fram av tí sum fór fram í 2001, tá løgreglan so íðin vardi arbeiðsgevarasíðuna.

Arbeiðsgevarafelagið fiskar eftir at fáa løgregluna at leggja upp í aftur hesuferð

Ikki er ilt at lesa millum linjurnar, at Arbeiðsgevarafelagið aftur undir hesum verkfallinum vil hava fútan og løgregluna at leggja seg út í lógliga verkfall okkara.

Vit skulu tó gera bæði Arbeiðsgevarafelagnum og fútanum greitt, at vit ætla ikki at lata okkum ræða av beinleiðis og óbeinleiðis hóttanum teirra, tí vit ætla framvegis at stríðast fyri rættvísu lønarkrøvunum hjá limum okkara.

## Hóttir við knívi

HÓTTAN
*Ingrid Bjarnastein*

Beint fyri klokkan fýra náttina til leygardagin vóru tveir mans, sum gingu við Keypsamtøkuna í miðbýnum steðgaðir av einum øðrum manni. Hesin maðurin tekur ein knív fram, og hóttir við at stinga menninar. Á ein ella annan hátt fáa menninir tosa hóttandi mannin frá at stinga, og brádliga rennur maðurin bara avstað.

Politiið í Havn upplýsir, at teir hava fingið eina góða frágreiðing um, hvussu maðurin sær út, og arbeitt verður í løtuni við at fanga mannin.

## Rútar brotnir

HERVERK
*Ingrid Bjarnastein*

Um vikuskiftið, sum hevur verið rættiliga langt av tí, at Dýri biðidagur var fríggjadagin, hevur politiið í Havn fingið tvær fráboðanir um herverk.

Annað var í Tróndargøtu, har ein rútur var brotin, og somuleiðis var ein rútur eisini brotin í Dómaraskrivstovuni í C. Pløyens gøtu.

Politiið hevur ongan gerningsmann funnið, og heldur ongin er mistonktur enn.

Upplýst verður annars av politigarðinum, at løgreglan hevur verið úti til húsaófriðir einar tvær ferðirnar um vikuskiftið, og nøkur smærri ferðsluóhapp hava eisini verið. Men ongin fólkaskaði stóðst av ferðsluóhappunum.

Fýra persónar hava verið og gist í brummuni um vikuskiftið.

Onkur er eisini vorðin tikin fyri at koyra ávirkaður, men politiið ásannar, at nógv minni koyring er nú, tí tað er verkfall.